


# EB/Streymur framvegis í Nike

EB/Streymur hevur í nøkur ár havt avtalu við Sportmaster, haðani teir hava fingið spælidraktir, venjingarbúnar, bóltar, gaggur og onnur ting, sum hoyra heima á einum fótbóltsvølli.

Nú er hendan avtala so eisini skrivlig, og komandi fimm árini fer EB/Streymur at spæla í Nike búnum.

Blá/svarti búnin, sum EB/Streymur leikti í í fjør, var rættiliga myrkur at síggja til, men soleiðis fara búnarnir ikki at síggja út komandi kappingarár. Tann myrka bláa rípan í búnanum verður skift út við eina ljósari bláa farvu, og sum skilst, so fer komandi búnin hjá EB/Streymi at vera líka sum búnin hjá italska oddaliðnum, Inter Milan.

# Ronaldo aftur til Italia

Góðu avrikini hjá Van Nistelrooy hava gjørt sítt til, at Ronaldo at kalla bert situr á beinkinum í Real Madrid. Lønin er tó til meira enn hetta, og tí hevur Fabio Capello einki ímóti, at Ronaldo verður seldur til annað felag. Áður hevur ljóðað, at Nike, sum er sponsorur hjá Ronaldo, vil hava hann til Juventus, men eisini Milan hevur sýnt áhuga. Varaforsetin í felagnum, Adriano Galliano, sigur, at enn tosa feløgini ikki saman um hetta, men hann leggur aftur, at er talan ikki um órímilig krøv úr Madrid, so kann Ronaldo væl koma til Milan, áðrenn transfer vindeygað letur aftur.

## Lutakast um ein mánað

**Lutakast til EM-undanspælið fyri U-21 landslið verður í Stockholm tann 13- februar, og annar av venjarunum, Bill McLeoud Jacobsen, vónar, at teir fara at møta onkrum norðanlandi**

FÓTBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um ikki so langa tíð skal føroyska U-21 landsliðið í fótbólti í eldin. Enn er ikki greitt, hvørjum liðum vit fara at møta, men lutakast til EM-undankappingini fyri U-21 landslið verður á skránni í Stockholm tann 13. februar.

Annar av venjarunum, Bill **McLeoud Jacobsen** sigur seg vóna, at landsliðið fer at møta onkrum av Norðanlondunum.

– Tað hevði verið ótrúliga stuttligt at møtt onkrum av Norðanlondunum. Flestu leikararnir hava royndt at spælt ímóti teimum í yngru landsliðunum, so vit kenna eitt sindur til hesi londini.

Bill sigur eisini, at teir vóna ikki at koma í bólk saman við ov nógvum eystanlondum.

– Tað er nakað sum við A-landsliðnum, tí vit vilja helst sleppa frá eysturevropeisku londunum. Langt er at reisa, og so eru hesi londini ofta rættiliga sterk eisini. Hinvegin vilja vit heldur enn gjarna møta liðum á okkara støði úr Vesturevropa, og so hevði verið stuttligt at fingið okkurt av heilt góðu liðunum.

# U-21 landsliðsvenjarar settir

**Bill McLeod Jacobsen og Heðin Askham skulu standa á odda fyri føroyska U-21 landsliðnum í mansfótbólti, og hesir báðir eru ikki óroyndir innan landsliðsarbeiði hjá føroyska fótbóltssambandinum**

FÓTBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Jens Erik Magnussen, formaður í landsliðsnevndini, tekur lógvatak við teir báðar nýggju landsliðsvenjararnar*

*Mynd: ww.football.fo*

Í morgun fingu vit orðið á annan av nýggju venjarunum hjá føroysku U-21 landsliðnum, Bill McLeod Jacobsen. Hann var staddur í París, har hann saman við øðrum venjarum hjá FSF júst stóð og hugdi at venjingum hjá venjarum í Fraklandi, sum eru í gongd við at taka A-venjaraútbúgvingina hjá UEFA. Føroyska venjararnir koma til Fraklands í gjár, og teir koma heimaftur fríggjadagin.

### Venjingarnar byrja skjótt

Bill McLeod Jacobsen sigur, at teir báðir ætla sær í gongd við venjingarnar skjótast gjørligt.

– Síðst í hesum mánaðinum fara vit at kalla leikararnir inn til venjingar, har vit fyrst og fremst fara at kanna teirra fysiska støði. Hetta er sum ein liður í ætlanini hjá A-landsliðnum, har teir eisini kanna fysiska førleikan hjá leikarunum.

Eftir venjingarnar síðst í mánaðinum er í roynd og veru klárt hjá leikarunum at brynja seg til kappingina fyri U-21 lið. Tí lutakast til EM-undankappingarbólkarnar fyri U-21 lið verður longu á skránni í Stockholm tann 13. februar, so enn er ikki greitt, hvørjum liðum vit møta, men landsliðsvenjarin sigur seg vóna, at Føroyar ikki koma at møta ov nógvum eysturevropeiskum londum.

– Vit vilja helst sleppa undan teimum eysturevropeisku londunum. Langt er at ferðast, og hesi londini eru ofta sera sterk. Hinvegin hevði verið ótrúliga stuttligt at møtt onkrum av norðanlondunum, og so vóna vit at møta onkrum av heilt sterku londunum eisini.

### Byggja víðari á yngru landsliðini

Bill sigur eisini, at endamálið við U-21 landsliðini er at byggja víðari á yngru landsliðini.

– Munurin hevur verið ov stórur hjá leikarunum at fara beinleiðis frá U-19 og uppá A-landsliðið. Tí meti eg tað vera sera gott, at vit nú hava fingið eitt U-21 landslið. Nú kunnu vit byggja víðari á yngru landsliðini, og ungu leikararnir fáa heldur meir hár á bringuna, áðrenn teir vera blakaðir í eldin á A-landsliðnum.

Bill sigur eisini, at hann og Heðin eru sera spentir uppá júst hetta landsliðið, tí at leikararnir í hesum árganginum hava fingið sera góð úrslit, ta´teir leiktu við yngru landsliðunum.

– Tað verður spennandi, at U-21 landsliðið verður skotið í gongd við júst hesum árganginum. Leikararnir í hesum árganginum hava fingið sera góð úrslit fyri okkurt av yngru landsliðunum fyrr, so nú verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at hilnast hjá okkum. Vit skulu í øllum førum royna at spæla okkara spæl, og fyri okkum er tað sera nærliggjandi at fáa liðið at skjóta mál.

Bill leggur afturat, at teir ætla eisini at leggja stóran dent á umstillingsspælið, soleiðis at leikararnir skjótt kunnu venda verju til álop og øvugt.

At enda sigur klaksvíkingurin, at teir eru sera spentir til uppgávurnar, sum nú liggja fyri framman. Hann ásannar, at mótstøðan helst verður væl harðari, enn leikararnir hava royndt áður, men hetta skal ikki steðga teimum. Teir ætla sær at fáa so góð úrslit, sum yvirhøvur møguligt, og so er endamálið eisini at gera leikararnar búnar til A-landsliðið,

## Máltindurin

**Atlantic Airwas-deildin:**

| | | |
|---|---|---|
| Finnur Hansson | StÍF | 103 |
| Damir Oros | KÍF | 100 |
| Blagoje Buha | Neistin | 84 |
| Rókur Akralíð | Kyndil | 75 |
| Esbern Patursson | H71 | 72 |
| Hans Áki Dal Christiansen | Kyndil | 70 |
| Sámal Joensen | VÍF | 69 |
| Tróndur Kragesten | Neistin | 65 |
| Daniel Rapa | KÍF | 59 |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 58 |

**Sunset deildin:**

| | | |
|---|---|---|
| Nicoleta Radu Hansen | Neistin | 101 |
| Daiva Tuomaite | VB | 94 |
| Lina Andriulyte | Kyndil | 73 |
| Ninna K. Johansen | StÍF | 57 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 55 |
| Alina Olaru | Stjørnan | 49 |
| Anja Heinadóttir | Kyndil | 41 |
| Durita Christophersen | Stjørnan | 38 |
| Simona Petersen | Stjørnan | 37 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 36 |